

*Henrik Larsen ivast ikki eina løtu í, at talan verður um eina serstakliga trupla uppgávu, um føroyska fótbóltslandsliðið skal fáa stig burtur úr dystinum mikukvøldið*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Synd um vápnini ikki verða nýtt

**Kypros hevur eitt gott lið, men føroyska liðið er eisini sera væl fyri, heldur Henrik Larsen, sum eisini frøist um góðu avrikini hjá føroysku útisetunum**

VENJARIN
*Jákup Mørk*

- Sjálvandi vilja vit gjarna vinna. Tað er jú útgangsstøðið hjá okkum, hvørja ferð farið verður á vøllin. Men tú skalt samstundis minnast til, at Kypros altso hevur eitt rættiliga gott lið.

Somikið greitt er svarið frá Henrik Larsen, tá vit eftir seinnu venjingina hjá landsliðnum mánadagin settu mest sum obligatoriska spurningin um, hvørt tað fer at verða hesaferð, at Føroyar vinna sær ein sigur í undankappingini.

Og handan svarið búgva eisini fleiri grundgevingar, sum Henrik ikki heldur tala føroyska liðnum til fyrimuns.

- Fyrst og fremst, so var tað eitt ótrúliga gott úrslit, sum vit fingu á Kypros í fjør. Vit spældu upp til okkara allarbesta, men vit vóru sera hart kroystir móti endanum av dystinum. Kanska eisini tí hitin var so nógvur, men tí partinum sleppa vit so undan hesaferð.

- Hartil kemur, at Kypros í dag tykist vera sterkari, enn teir vóru tá. Teir hava skift venjara, og hesin tykist hava fingið meira taktiskt medvit inn á liðið. Fleiri av bestu spælarunum hjá teimum spæla í Grikkalandi, og tað gevur sjálvandi liðnum nakað, og eisini í Champions League hevur Famagusta sýnt sera stóra styrki. So tað verður undir ongum umstøðum nakar lættur dystur hjá okkum.

- Sjálvandi er teirra kapping ikki byrjað enn, og tað kann geva okkum ein fyrimun, men vit skulu altso minnast til, at tað framvegis eru á leið 10 ferðir so nógv fólk á Kypros sum í Føroyum, so teirra grundarlag vil alt annað líka vera størri, heldur venjarin.

## Gott við útisetum

Men hóast sterka mótstøðu, so skerst ikki burtur, at eisini føroyska liðið hevur nakrar avgjørdar styrkir, sum vit kanska kunnu gera okkum dælt av.

- Eg haldi í øllum førum, at hópurin sær skilagóður út. Vit hava nakrar áleyparar, sum tykjast sera hvassir í løtuni, og fleiri av hinum spælarunum hava eisini gjørt tað gott í seinastuni, so eg haldi, at vit eru væl fyri.

Tað hevur víst seg, at Føroyar seinastu tíðina hava fingið alt fleiri fótbóltsútisetar. Á hvønn hátt kemur hetta liðnum til góðar.

- Tað ger tað sjálvandi á tann hátt, at vit gjarna skulu fáa betri spælarar. Tá farið verður uttanlands, so gevur tað spælarunum nakað. Teir fáa nýggjar avbjóðingar, teir koma gjarna at venja og spæla á hægri støði, og yvir høvur er ein slík tilvera nakað, sum ger menninar harðari. Og so vísir tað seg ofta, at teir, sum ikki eru í Føroyum dagliga, eru eyka motiveraðir, tá teir so eru heima.

- Sjálvur havi eg fyrr tikið til, at um Danmark bara skuldi brúkt spælarar úr superliguni, so høvdu vit ikki komið so langt, sum vit ofta komu.

## Mugu venja høgrabeinið

Alt í alt stendur soleiðis kanska upp og niður, um metast skal um fortreytirnar hjá liðunum báðum. Hinvegin, so er einki dulsmál, at nakrar broytingar mugu gerast á føroyska liðnum, sum er rakt av fleiri avboðum.

- Tað er sjálvandi spell, tá menn eru leikbannaðir ella skaddir, men tað mugu vit so liva við. Í mun til seinast eru tað hesaferð Jákup, Fróði og Julian, sum ikki fáa verið við, og so mugu vit jú seta aðrar í teirra stað.

Merkir stóra útskiftingin, at tað verður ein varislig 4-5-1 uppstilling á liðnum mikukvøldið, ella skulu vit rokna við, at talan verður um tveir áleyparar.

- Tað verða tveir áleyparar. Tá vit hava tveir mans, sum eru somikið væl fyri, so er tað næstan synd, um vit ikki gera nýtslu av teimum, heldur Henrik, áðrenn hann smílandi leggur afturat:

- Men so má venjingarskráin í morgin nokk eisini innihalda skotvenjingar við høgra beini.

## Hodgson skal venja Finnland



LANDSLIÐSVENJARI
*Jákup Mørk*

Tá Todi Jónsson fyri fyrstu ferð gjørdist danskur meistari, var tað enski Roy Hodgson, sum stóð við stýrisvølin í FCK.

Fyri góðari viku síðani var Roy Hodgson í mótpartinum hjá Toda, tá Start royndi seg á útivølli móti Viking, har ein 1-1 javnleikur varð úrslitið.

Tað kann eisini væl verða, at vegirnir hjá teimum báðum aftur fara at renna saman, men so skulu Føroyar helst fáa Finnland í sín pott, tá lutakastið til EM-kappingina í 2008 fer fram.

Tað er nevnliga greitt, at Roy Hodgson nú verður finskur landsliðsvenjari. Hetta váttar høvuðspersónurin sjálvur í norskum miðlum týsdagin, og sjálvur sigur hann, at tað eru altjóða avbjóðingarnar, sum eru atvoldin til hetta.

- Finnland kann geva mær tær altjóða avbjóðingarnar, sum Viking ikki kann geva mær, og tí havi eg tikið av tilboðnum.

Í Viking harmast tey sum vera man missin, men dentur verður tó lagdur á, at hetta verður gjørt í allari vælvild partanna millum. Og hetta árið út eitur venjarin hjá Viking framvegis Roy Hodgson.

Roy Hodgson er annars eitt gott dømi um, hvussu trupult tað er at verða profetur í egnum landi. Einasta venjarastarv av týdningi, sum hann hevur havt í Onglandi, var, tá hann eitt skifti stóð á odda fyri Blackburn. Har var úrslitið gott fyrsta árið, men síðani gekk bara skeiva vegin, og at enda varð Hodgson sekkjaður.

Annars hevur hann við góðum úrslitum virkað sum venjari í Svøríki, Noreg og Danmark. Hann var eisini venjarin, sum av álvara fekk Sveis á altjóða fótbóltskortið, tá hnn var landsliðsvenjari hjá teimum miðskeiðis í 90'unum, og í tveimum umførum hevur hann eisini verið venjari í Italia. Hetta hjá Inter og Udinese.

----

## Óheppin málverji

Meðan Todi Jónsosn var hetjan, var tað meira enn nakar málverjin hjá Rosenborg, Espen Johnsen, sum var í øvuta leiklutinum, tá Start um vikuskiftið vant burtur úr Rosenborg.

Landsliðsmálverjin átti sín lut í teimum báðum fyrstu málunum hjá Toda. Hann varð seinni rikin av vølli, tá hann í hevnisøku setti fót fyri føroyska landsliðsáleyparanum, og hartil varð hann eisini skaddur í tacklingini frá Toda, sum førdi til hendingina. Ein skaði, sum noyddi Johnsen at geva avboð til norska landsliðið, sum mikukvøldið skal spæla venjingardyst móti Sveis.

Norsku miðlarnir skrivaðu eisini eftir dystin, at hann hevði givið S t a r t - á s k o ð a r u n u m »fingurin« undir dystinum, men hetta varð so ikki tikið við, tá leikbannið skuldi ásetast.

Ein leikdagur hildu tey í norska fótbóltssambandinum vera nóg mikið hjá málverjanum.

**-jm**